UTTAN ÚR HEIMI

# Schrøder vil hava val aftan á dyggan ósigur



*Tað var ein álvarssamur Gerhard Schrøder, sum sunnukvøldið boðaði frá, at hann ætlar at framskunda valið til Samveldisdagin. Upprunaliga skuldu týskarar á val næsta ár, men nú verður tað væntandi í heyst*

*Mynd: Reuters*

**Týsku sosialdemokratarnir vóru fyri einum lemjandi ósigri um vikuskiftið, tá flokkurin tapti landspartavalið í Nordhrein-Westfalen fyri fyrstu ferð í 39 ár**

TÝSKLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Undan valinum í Nordhrein -Westfalen spurdu summir týskarar, um Gerhard Schrøder, kanslari, mundi fara at leggja frá sær, um sosialdemokratarnir taptu valið. Teir taptu, men Schrøder fer ikki frá. Tvørturímóti vil hann hava val til samveldisdagin sum skjótast. Tað høvdu tey fægstu væntað, og sunnukvøldið søgdu politiskir eygleiðarar í Berlin, at avgerðin hjá kanslaranum var einki minni enn ein bumba. .

- Vit vilja framskunda valið eitt ár, so veljararnir kunnu taka støðu til, hvønn tey vilja hava at stýra Týsklandi, segði sosialdemokratiski floksformaðurin, Franz Múntefering, sunnukvøldið.

Formaðurin í tí størsta andstøðuflokkinum CDU, Angela Mærkel, var skjót at svara, at hennara flokkur er til reiðar at taka dystin upp við sosialdemokratarnar og Tey grønu um stjórnarvaldið.

### Sum væntað

Úrslitið av landspartavalinum í Nordhrein-Westfalen kom ikki óvart á nakran, heldur ikki leiðsluna hjá sosialdemokratunum. Í 39 ár hevur flokkurin stýrt tí fólkaríkasta landspartinum í Týsklandi, men nú flyta umboð fyri CDU og Fríu Demokratarnar inn í stjórnarskrivstovurnar í landspartahøvuðsstaðnum Dússeldorf.

Úrslitið var greitt longu eina lítla løtu eftir, at valhølini lótu aftur, tí kanningar uttan fyri valhølini vístu, at sosialdemokratarnir høvdu fingið 37,5 prosent av atkvøðunum, meðan CDU hevði fingið 45 prosent. Tí kundi høvuðsvalevnið hjá CDU, Júrgen Rúttgers, takka veljarunum fyri álitið.

Eisini Angela Mærkel, floksformaður, var ovurfegin um úrslitið, tí tað ger, at hon hevur uppaftur betri møguleikar at taka við sum kanslari eftir valið til Samveldisdagin. Men politiskir eygleiðarar í Berlin siga kortini, at enn er ov tíðliga at siga, at Schrøder noyðist frá tá. Hann er tiltikin stríðsmaður og kann venda gongdini.

### Stórur áhugi

Áhugin fyri landspartavalinum í Nordhrein-Westfalen var sera stórur. Ikki færri enn 1.400 tíðindafólk fylgdu við uppteljingini í tinghúsinum í Dússeldorf, og 31 sjónvarpsstrøðir sendu beinleiðis frá uppteljingini. Harumframt vóru ikki færri enn 35 útlendskar sjónvarpsstøðir umboðaðar í tingsalinum.

Týskland hevur álvarssamar búskaparliga trupulleikar at stríðast við, og arbeiðsloysið er tað størsta í 70 ár. Stjórnin hjá Schrøder hevur framt fleiri umskipanir í búskaparpolitikkinum tey bæði seinastu árini, men kortini eru umleið fimm milliónir týskarar ella 12 prosent av arbeiðsmegini arbeiðsleysir, skrivar Reutwers.

## USA hóttir ST

Fleiri politikarar í amerikonsku Kongressini hótta nú við at skerja amerikanska stuðulin til ST, um bygnaðurin í heimsfelagsskapinum ikki verður broyttur.

Tað seinasta átakið er komið frá uttanríkisnevndini hjá Kongressini, sigur mælir til at skarva 50 prosent av amerikanska stuðlinum, verður ST ikki nýskipað. USA rindar árliga næstan ein fjórðing av útreiðslunum hjá ST, men fleiri politikarar halda, at ov lítið fæst fyri pengarnar.

Talsmaðurin hjá Kofi Annan, aðalskrivara, segði sunnudagin, at amerikanska hugskotið er illa umhugsað, tí tað fer bara at gera ilt verri. Talsmaðurin mælti Kongressini til at samstarva við ST og hini 190 limalondini heldur enn at hótta við fíggjarligum tiltøkum.

Uttanríkisnevndin hjá Kongressini í Washington heldur, at USA eigur at skerja játtanina til 17 verkætlanir hjá ST. Eitt av teimum umstríddu málunum er altjóða mannarættindanevndin. USA sigur seg ikki kunna góðtaka, at lond, sum bróta mannarættindini, kunnu vera limir í nevndini, og uttanríkisnevndin sigur, at verður hetta ikki broytt, eigur USA at skarva 50 prosent av sínari játtan til mannarættindanevndina. Eygleiðarar í New York siga, at tilmælið hjá uttanríkisnevndini fær sera álvarssamar avleiðingar, verður tað samtykt. Teir vísa á, at ST fekk stórar trupulleikar í nítiárunum, tí USA sýtti fyri at gjalda felagsskapinum eina milliard dollarar, sum landið skyldaði.

## Hermenn doyðu í kulda

Alt bendir á, at 45 ungir kilskir hermenn doyðu í kulda, tá teir fóru á eina venjingarferð í Andesfjøllunum í síðstu viku, og leygardagin kunngjørdi Ricardo Lagos, forseti, landasorg í tríggjar dagar. Samstundis leitaðu bjargingarlið eftir hermonnunum, og í gjár varð kunngjørt, at bjargingarliðini høvdu funnið fleiri lík í fjøllunum tætt við argentinska markið og einar 500 kilometrar sunnan fyri høvuðsstaðin Santiago.

Sorgarleikurin hendi, tá 433 hermenn vórðu sendir á eina venjingarferð í teimum høgu fjøllunum. Illveður kom á teir, men hermenninir høvdu als ikki klæðir til tann nógva kuldan, og hildið verður, at teir flestu doyðu í kulda í tjøldunum.

Kilska herleiðslan hevur verið fyri hvøssum atfinningum seinastu dagarnar. Verjuovastin, Juan Emilio Cheyre, generalur, hevur givið trimum yvirmonnum sekkin, tí teir høvdu ábyrgdina av venjingini hjá teimum ungu hermonnunum, skrivar Reuters.

## Oljufríar leiðir

Í seinastuni hava norskir politikarar kjakast um, hvørt tað er rætt at fara undir oljuvinnu í Barentshavinum og í pørtum av Lofoten ella ikki, men nú vísir ein kanning, at flestu norðmenn eru ímóti.

Kanningin, sum er gjørd fyri norsku deildina av World Wildlife Foundation, vísir, at 60 prosent av teimum spurdu halda tað vera skeivt at fara undir oljuvinnu í Barentshavinum. Teir halda eisini, at partar av leiðunum úti fyri ofoten eiga at vera oljufríar. Ikki óvæntað vísir kanningin, at í Finnmørkini er meiriluti fyri oljuvinnu í Barentshavinum, tí har vænta fólk, at vinnan kann útvega nógv arbeiðspláss.

World Wildlife Foundation er tann einasti náttúruverndarfelagsskapurin í Noegi, sum er til reiðar at góðtaka oljuvinnu í Barentshavinum og úti fyri Lofoten, men felagsskapurin hevur kortini víst á fimm ávísar leiðir, sum eiga at verða friðaðar, skrivar Aftenposten.

## Róptu eftir Lauru Bush

Amerikanska forsetafrúan, Laura Bush, fekk eina heldur óvæntaða móttøku, tá hon sunnudagin var og vitjaði Grátimúrin og Fjallamoskuna í Jerusalem.

Við Grátimúrin róptu fleiri jødar á hana og kravdu, at USA skal lata Jonathan Pollard leysan. Hann er amerikanskur jødi, men er dømdur lívlangt fongsul fyri at hava njósnast fyri Ísrael. Við Fjallamoskuna vóru tað palestinar, sum vístu sína misnøgd við tann amerikanska politikkin í Miðeystri.

Áðrenn hon kom til Ísraels, hevði Laura Bush verið í Jordan, og úr Jerusalem helt hon leiðina fram til Egyptalands.